**Dagur:** 07. mai 2009
**Skrátal:** 70-36200
**Máltal:** 090443 -/10

# Reglugerð um landsroynd

Við heimild í § 14, stk. 5 í løgtingslóg nr. 125 frá 20. juni 1997 um fólkaskúlan, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 64 frá 7. juni 2007 verður ásett:

§ **1**. Til tess at meta um støðið í fólkaskúlanum, skipar Mentamálaráðið fyri landsroynd eina ferð um árið.
*Stk. 2*. Fráskúla, sum er skipaður sambært løgtingslóg nr. 42 frá 26. mars 2002, skal standa í boði at luttaka í landsroyndini. Verður landsroynd skipað í frískúla, eru ásetingarnar í hesi reglugerð galdandi.

§ **2**. Skúlaleiðarin hevur ábyrgdina av, at royndin verður hildin sambært hesum reglum.

§ **3**. Mentamálaráðið ásetur og boðar skúlunum frá tíðarskeiðnum, tá ið landsroyndin verður hildin.

## Fremjing av landsroynd

§ **4**. Landsroyndin verður hildin í 4. og 6. flokki í føroyskum, støddfrøði og náttúru og tøkni.

§ **5**. Í føroyskum fevnir royndin um lesing og skriving. Royndin í lesing er at lesa og skilja tekst, og skrivligi parturin er eitt skrivligt avrik. Næmingar í 6. flokki hava herumframt ein málløru part.
*Stk. 2*. Næmingar í 4. flokki fáa 90 minuttir til royndina í føroyskum, 45 minuttir til royndarpartin at lesa og skilja tekst og 45 minuttir til skrivliga avrikið.
*Stk. 3*. Næmingar í 6. flokki fáa 120 minuttir til royndina í føroyskum, 45 minuttir til royndarpartin at lesa og skilja tekst, 45 minuttir til skrivliga avrikið og 30 minuttir til málløruuppgávuna.

§ **6**. Í støddfrøði og náttúrulærugreinunum er royndin eitt skrivligt avrik í hvørjari lærugrein.
*Stk. 2*. Næmingar í 4. flokki fáa 45 minuttir til royndina í støddfrøði og 45 minuttir til royndina í náttúru og tøkni.
*Stk. 3*. Næmingar í 6. flokki fáa 60 minuttir til royndina í støddfrøði og 60 minuttir til royndina í náttúru og tøkni.

## Hjálpartól og stuðul

§ **8**. Skúlaleiðarin skal tryggja, at næmingar, sum vegna likamligt ella sálarligt brek, serligan tørv v.m. hava rætt til hjálparamboð ella hjálp/stuðul fyri at fremja royndirnar, fáa neyðugu hjálpina.
*Stk. 2*. Mentamálaráðið veitir neyðuga leiðbeining í mun til stk. 1.

## Umsjón

§ **7**. Skúlaleiðarin skal tryggja, at umsjón er í hølunum, har royndirnar verða framdar.
*Stk. 2.* Í minsta lagi eitt umsjónarfólk umframt læraran í lærugreinini skulu verða í royndarhølunum. Er næmingatalið hægri enn 26, verður eitt umsjónarfólk sett afturat fyri hvørjar 14 næmingar.
*Stk. 3.* Har ikki nóg nógv umsjónarfólk eru millum lærararnar í skúlanum, skulu umboð fyri skúlastýrið verða umsjónarfólk.

## At rætta royndaruppgávur

§ **9.** Mentamálaráðið tilnevnir fólk í arbeiðsbólk, sum skal rætta royndaruppgávurnar og viðgera royndarúrslitini.

## Kunning um royndarúrslit

§ **10**. Royndarúrslitini verða send skúlanum saman við einari viðgerð, sum lýsir førleikar og neyðugar ábøtur.
*Stk. 2.* Skúlaleiðarin fær innlit í úrslitini hjá næmingum skúlans, umframt miðaltalið fyri hvønn flokkin. Eisini fær skúlin at vita, hvussu hann liggur í mun til miðalúrslitið fyri landið.

§ **11.** Úrslitini hjá einstøku næmingunum verða ikki almannakunngjørd.

§ **12**. Skúlaleiðarin skal tryggja, at landsroyndin verður ein liður í arbeiði skúlans at eftirmeta undirvísingina sbrt. § 14, stk. 1 og 6 í fólkaskúlalógini.
*Stk. 2.* Skúlin gevur næmingunum boð um úrslitið av royndini.
*Stk. 3.* Skúlin skal tryggja, at foreldur fáa kunning um úrslitið hjá sínum barni, miðalúrslitið fyri flokkin hjá barninum, umframt at tey fáa at vita, hvussu flokkurin liggur í mun til miðalúrslitið fyri landið.
*Stk. 4.* Lærarin, sum hevur flokkin í lærugreinini, fær innlit í úrslitini hjá øllum næmingunum í flokkinum og skal bara nýta hesi í sambandi við arbeiði sítt at menna undirvísingina hjá einstaka næminginum.
*Stk. 5.* Lærarin skal kunna foreldrini um úrslitini hjá teirra børnum umframt miðaltalið fyri flokkin og fyri landið alt.

## Gildiskoma

§ **13**. Henda reglugerð kemur í gildið 7. mai 2009.

**Mentamálaráðið**

Olaus Jespersen
*deildarstjóri*